MRCC og Jøkulfell:

# Neyðugt at bøta um fleiri viðurskifti

**Norsk Veritas er nú liðugt at kanna leiklutin hjá MRCC støðini í sambandi við vanlukkuna, tá ið Jøkulfell gekk burtur fyrr í ár**



*Norsk Veritas mælir til at gera fleiri ábøtur á sjóbjargingarstøðini í Føroyum*

SJÓBJARGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– MRCC støðin tók eina hóskandi avgerð, men tað besta hevði at sent eina tyrlu á vanlukkustaðið skjótari enn tað varð gjørt.

Tað staðfestir Norske Veritas í kanningini, sum tað hevur gjørt um leiklutin hjá MRCC støðini í sambandi við vanlukkuna, tá ið Jøkulfell fekk burtur í ein landnyrðing úr Fugloy 7. februar.

Eftir vanlukkuna varð funnist harðliga at MRCC støðini fyri at hon ikki hevði sent føroysku bjargingartyrluna á staðið, men ístaðin læt hana standa og bíða til yvirlit varð fingið yvir støðuna.

Tí gjørdi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø av at seta eina óhefta kanning í verk av bjargingini og hann bað Norsku ráðgevingarfyritøkuna »Det Norske Veritas« um at gera kanningina.

Frágreiðing varð handað Fiskimálaráðnum fyri einum mánaða síðani og síðani hevur hon verið til ummælis hjá viðkomandi pørtum.

– Frágreiðingin staðfestir, at avgerðin hjá Sjóbjargingarstøðini um fyrst at senda sjóverjuskipið, Vædderen, ið lá norðanfyri Føroyar og sum hevði tyrlu umborð, til vanlukkustaðið, samanhildið við at senda føroysku Bell 412 bjargingartyrluna, ið var stødd á flogvøllinum í Vágum, var ein hóskandi avgerð, sigur Fiskimálaráðið í einum tíðindaskrivi.

Det Norske Veritas staðfestir somuleiðis í frágreiðingini, at um fyrimyndarliga varð atborið, kundi bjargingararbeiðið gingið nakað annarleiðis. Eitt nú hevði tað verið hóskandi at sent tyrlu á vanlukkustaðið, skjótari enn tað varð gjørt.

### Nógv viðurskifti at bøta um

Samstundis vísir Norsk Veritas á fleiri viðurskifti í sjótilbúgvingini, ið bøtt eigur at verða um.

Hugsað verður bæði um venjingar, mannagongdir, og samskifti.

Fiskimálaráðið tekur frágreiðingina og tilmælini frá Det Norske Veritas til eftirtektar. Stig verða nú tikin til at styrkja um tilbúgvingina og at seta í verk tær ábøtur, sum Det Norske Veritas mælir til í sínari frágreiðing.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur nú heitt á Elmar Højgaard, leiðara á Fiskiveiðieftirlitinum, um saman við virkandi leiðaranum á Sjóbjargingarstøðini, Jóhan Jacob Jakobsen, at taka stig til eitt samstarvsráð, har allir partar, sum vanliga taka lut í sjóbjarging eru umboðaðir. Samstarvsráðið skal styrkja um samstarvið í tilbúgvingini, tryggja at mannagongdir eru greiðar og at samskiftið er ótarnað. Somuleiðis skal samstarvsráðið ráðgeva landsstýrismanninum um, hvørji átøk eiga at verða framd fyri at styrkja og betra føroysku tilbúgvingina á sjónum.

Fyrsta uppgávan hjá samstarvsráðnum verður at viðgera tilmælini um ábøtur í frágreiðingini frá Det Norske Veritas umframt viðmerkingarnar frá øðrum tilbúgvingarpørtum til hesa frágreiðing.

### Leiðarin sagt seg frá

Leiðarin á Sjóbjargingarstøðini, Djóni Weihe, hevur ikki verið til arbeiðis, meðan kanningin hjá Det Norske Veritas varð gjørd. Djóni Weihe, sum skuldi byrja aftur í starvinum nú, hevur søkt um farloyvi. Fiskimálaráðið hevur gingið umbønini á møti.

Djóni Weihe hevur samstundis boðað frá, at hann ikki heldur tað vera menniandi fyri Sjóbjargingarstøðina, um leiðsluviðurskiftini eru ógreið ta tíð, ið hann hevur farloyvi.

Hann hevur tí boðað frá, at hann ikki ætlar sær aftur í starvið sum leiðari á Sjóbjargingarstøðini tá ið farloyvið endar, so tá ið bygnaðarviðurskiftini á Sjóbjargingarstøðini eru viðgjørd, fer Fiskimálaráðið at søkja eftir nýggjum leiðara. Fyribilssetti leiðarin á Sjóbjargingarstøðini, Jóhan Jacob Jakobsen, fer at røkja leiðarastarvið á Sjóbjargingarstøðini til nýggjur leiðari er settur.

---

Barnagarður sjúnkaður:

# Umvælingararbeiði fyri milliónina

Gravmaskinurnar uttan fyri barnagarðin á Norðasta Horni arbeiða av lívsins kreftum í hesum døgum. Herfyri fekk Tórshavnar býráð boð um, at barnagarðurin á Norðasta Horni er sjúnkaður nakað, og fyri at fyribyrgja, at barnagarðurin sjúnkar enn meira, er eitt umfatandi umvælingararbeiði sett í verk á Norðasta Horni.

Ætlanin er at grava runt um allan barnagarðin, og at steinseta bygningin av nýggjum. Við framkomnari tøkni skal felagið, Articon, spræna nýtt betong undir bygningin, so barnagarðurin kann rættast upp aftur.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, sigur, at umvælingararbeiðið fer at kosta ein góða millión krónur. Borgarstjórin sigur, at orsøkin til, at barnagarðurin er sjúnkaður stavar helst frá upprunaligu bygginini av barnagarðinum, sum ikki hevur verið nóg góð.

**.páll**



*Eitt umfatandi umvælingararbeiði er sett í verk á Norðasta Horni. Orsøkin er, at barnagarðurin er sjúnkaður*

*Mynd: Jan Müller*

---

Annika Wardum lagt frá sær:

# Vantandi stuðul

Forkvinnan í Javnstøðunevndini seinastu knapt trý árini hevur lagt frá sær. Annika Wardum Joensen sigur, at hon gevst í nevndini vegna vantandi politiskan stuðul.

Dimmalætting skrivar, at Annika Wardum Joensen hevur so at siga onki hoyrt frá politiska mynduleikanum, síðani hon legði frá sær fyri nøkrum vikum síðani. Tað er landsstýrismaðurin við heilsumálum Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum, sum umsitur javnstøðumál.

Lógin um javnstøðu varð samtykt á Føroya Løgtingi í 1994. Við javnstøðulógini varð tað lógarfest, at arbeiðsgevarar hava ikki loyvi at gera mismun á starvsfólki vegna kyn, og at kvinnur og menn skulu hava somu løn fyri sama arbeiði.

Jan Mortensen, sum umboðar arbeiðsgevararnar, sigur, at spurningurin er, um skipanin ikki skal endurskoðast.

– At Annika Wardum Joensen hevur lagt frá sær er eitt symptom uppá, at skipanin ikki virkar. Fíggjarliga orkan røkkur ikki til at koyra tað stóra í Javnstøðunevndini. Tú kanst ikki fáa ein persón at brúka alla sína orku upp á Javnstøðunevndina, tá fíggjarlig orka ikki er til tess. Tað er upp til Føroya Landsstýri at gera av, um man vil gera nakað við javnstøðuspurningin. Sum er hava vit eina javnstøðunevnd við einari játtan á fíggjarlógini. Tað er tað heila. Tað tykist við hesum, at politikarar eru slopnir undan at taka støðu til spurningin um javnstøðu, sigur Jan Mortensen.

Tað bar ikki til at hitta landsstýrismannin við heilsumálum Hans Paula Strøm, tí hann er farin í feriu.

**-hkm**